## Kaj fekk fyrsta hemaran

So er fyrsti hávurin komin í Shark Atlantic kappingini. Tað var ein dani, Kaj Nielsen, sum fekk hann. Hann varð vigaður á Sjósavninum, og pílurin peikaði á 82 kg. Hetta kann sigast at vera ein bleyt byrjan til kappingina sum byrjaði 1. november. Kaj Nielsen togaðist í fjøruti minuttir, áðrenn hávurin yvirgav seg, og skiparin Magni Blástein fekk lívið av honum. Kaj Nielsen var bert komin upp til Føroya at fiska hemara, og ikki kann sigast annað at tað eydnaðist væl. Eftir at hava dyrgt í ein tíma tók hemarin. Hann tók ein hálvfrystan makrel, tá teir dyrgdu tætt við Barið á vágoynni.



## Suðuroyingar keypt tvær sýningar av Emil

Børn og vaksin í Suðuroy vilja eisini síggja Emil úr Lønnebergi. Tí hava tey keypt tvær sýningar. Hin 10. og 12. november koma tey norð um fjørð fyri at síggja leikin. Dánjal Johan Lisberg úr Sumba stendur fyri hesi samskipan í Suðuroy har allir skúlar og onnur verða við. Mentunarhúsið í Fuglafirði tekur 250 áskoðarar – og tað hevur verið ein sannur gravgangur eftir atgongumerkir og verið útselt. Hin 11. november verður ikki spælt – tað er valdagur. Men tað verða fleiri sýningar – og felagið vil lýsa við hesum sýningum skjótast gjørligt, sigur Klaksvíkar Sjónleikarfelag í tíðindaskrivi.

# Hjálpa bileigarum at fáa endurgjald

**Úrslitið av einum sakarmáli í Føroya Rætti í løtuni, kann verða, at fleiri túsund bileigarar skulu hava tilsamans einar 120 milliónir í endurgjaldi úr landskassanum og nú vil Sjálvstýrisflokkurin gera tað lættari hjá øllum at fáa fatur á pengunum**



*Kemur Dómsvaldið til ta niðurstøðu, at fleiri túsund bileigarar hava goldið ov nógv fyri bilin, vil Sjálvstýrisflokkurin hava løgtingið at tryggja, at allir fáa peningin endurgoldnan*

ENDURGJALD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í fleiri ár hevur ivi verið um, antin fleiri túsund bileigarar hava rætt til einar 120 milliónir tilsamans í endurgjaldi frá TAKS.

Orsøkin er, at TAKS ólógliga hevur kravt mvg av skrásetingargjaldinum á bilunum, sum eru keyptir í tíðarskeiðnum frá 1. mai í 1999 til 27. apríl í 2005.

Málið er fyri í rættinum í løtuni og verður niðurstøðan, at TAKS ikki hevði rætt at krevja MVG av skrásetingargjaldinum, ætlar Sjálvstýrisflokkurin at hjálpa bileigarunum at fáa endurgjald.

Tí hevur flokkurin nú lagt uppskot fyri Løgtingið um, at øll hesi málini skulu ikki fyrnast, sama, hvussu gomul tey eru.

Sostatt vil flokkurin tryggja, at allir bileigarar skulu fáa tað endurgjald, teir hava rætt til, hóast málið er yvir fimm ára gamalt.

Men samstundis vil flokkurin hava Løgtingið at samtykkja, at kemur dómsvaldið til ta niðurstøðu, at TAKS hevur tikið eitt ólógligt gjald frá bileigarunum, skulu landsstýrismaðurin í fíggjarmálum og TAKS gera eina skipan, so at allir bilførarar fáa sítt endurgjald sjálvvirkandi.

Tað merkir, at tað skal verða ábyrgdin hjá TAKS og landsstýrismanninum í fíggjarmálum at finna allar bileigararnar, sum hava goldið ov nógv fyri bilarnar og at syrgja fyri, at teir fáa pengarnar aftur.

- Vit halda, at tað er ílagi, at málið er lagt fyri dómsvaldið, tí so fáa vit eina endaliga avgerð. Men endamálið má vera, at allir bilførarir, sum hava goldið túsundtals krónur ov fyri bilin, fáa peningin aftur, sigur Kári á Rógvi, sum hevur lagt uppskotið fyri Løgtingið saman við Kára Petersen, ið hevur sæti á tingi í løtuni fyri Kára P. Højgaard.

### Kann ikki vera meiningin

Hann sigur, at kemur dómsvaldið til ta niðurstøðu, at bilførarar hava rætt til endurgjald, kann tað ikki vera meiningin, at hvør einstakur av hesum 3000 bileigarunum skulu reisa eitt kærumál ella eitt rættarmál ímóti TAKS fyri at fáa pengarnar, sigur Kári á Rógvi.

- Tað kann ikki vera ætlanin, at tey, sum hava orku, áræði og hegni til at fara undir eitt sakarmál, skulu fáa peningin, men tey, sum ikki hava orku, áræði og hegni til tess, skulu onki fáa.

- Tað hevði eisini fingið TAKS at drukna í umsitingarligum arbeiði at fingið fleiri túsund serskild krøv um endurgjald.

- Tað er púra vitleyst at stovna so nógv mál, tá ið øll kunnu avgreiðast skjótt og lætt undir einum, tí øll eru sama slag.

Kári á Rógvi sigur, at endamálið við uppskotinum, sum teir nú leggja fyri Løgtingið, er sostatt at tryggja, at allir bileigarar, ið hava goldið ov nógv fyri bilin, fáa somu viðferð frá landsins myndugleikum.

## FAKTA

1. mai 1999 vórðu dagføringar gjørdar í lógini um skrásetingargjald fyri innflutning av bilum.

28. apríl 2005 verður lógin broytt, soleiðis at heimildin at krevja inn ætlaða gjaldið verður í lagi.

25. oktober 2006 ger hjá Skatta og avgjaldskærunevndini úrskurð í kærumáli. Har verður staðfest, at tað ikki var lógarheimild at krevja inn millum 1. mai 1999 til 28. apríl 2005.

26. mars 2008 tekur Skatta- og avgjaldskærunevndin avgerð um, at avgerðin frá 25. oktober skal fylgjast, so leingi sum annar dómur ikki fyriliggur í málinum.

Skatta- og avgjaldskærunevndin er hægsti fyrisitingarligi myndugleiki innan skatta- og avgjaldsøkið. 15. apríl 2008 sendir Taks út tíðindaskriv. Her staðfestir stovnurin, at tey ikki meta Skatta- og avgjaldskærunevndina hava heimild at fastleggja rættarstøðuna í málum, sum ikki eru løgd fyri nevndina.

7. mai 2008 afturvísir Taks kæru frá borgara, sum hevur kravt mvg-afturbering í samband við keypi av persónbili. Talan er um mál millum borgaran og bilasøluna, sum hevur selt bilin, sigur Taks

Síðani Sosialurin í vár varpaði ljós á málið, hava hundraðtals borgarar vent sær til Taks og bilasølur kring landið. Og í einstøkum førum hava borgarar tikið seg saman í felags stevning móti Taks.

Enn er bert eitt mál endað við, at Taks hevur goldið borgara pening. Hetta er málið, sum varð avgreitt av kærunevndini tann 25. oktober 2006, men Taks hevur lagt málið fyri dómsvaldið at taka støðu til.

# TAKS bíðar sum longst

Skatta- og avgjaldskærunevndin, sum er hægsta fyrisitingarmyndugleiki hjá TAKS, hevur staðfest at TAKS hevur tikið eitt ólógligt gjald fyri bilarnar, sum eru keyptir frá 1. mai í 1999 til 27. apríl í 2005.

TAKS hevur ikki góðtikið hetta og hevur lagt málið fyri rættin.

Kemur Føroya Rættur til ta niðurstøðu, at TAKS hevur tikið eitt ólógligt gjald, eiga einir 3000 bileigarar sostatt at fáa mvg av skrásetingargjaldinum endurgoldið.

Tilsamans er talan um einar 120 milliónir krónur, sum bileigarar eiga í endurgjaldi frá TAKS.

Men í hesum føri kann tað fáa ein avgerðandi týdning, at eru málini eldri enn fimm ár, eru høvuðsreglan, at tey eru fyrnað og so fær bileigarin ikki endurgjaldið.

Í hesum sambandi kann leggjast afturat, at í tíðindaskrivi hevur TAKS boðað frá, at farið verður fram eftir 5-ára fyrning.

- Hetta merkir, at um hálvtannað ár verða øll krøv, ið ikki eru reist sum kærumál ella rættarmál, fyrnaði og bileigarar missa endurgjaldið, staðfestir Kári á Rógvi.

Men skuldi tað hent, at dómsvaldið kemur til ta niðurstøðu, at TAKS hevur kravt eitt ólógligt gjald fyri bilar, sum keyptir frá 1. mai í 1999 til 27. apríl í 2005, vil Sjálvstýrisflokkurin forða fyri, at fyrningarfreistin skal vera orsøk til, at nógvir bilførarar ikki skulu fáa peningin aftur, sum teir hava goldið ov nógv fyri bilarnar.